# Vælkomin til dyst í Fløtugerði



HAVSBRÚN

**Leikskrá nr.12**

– SKÁLA

Sunnudagur 2. oktober 2016

effo deildin

Mynd: Norðlýsið

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði. Í dag taka vit ímóti Skála, sum hava tryggja sær luttøku í deildini í næsta ár. Hetta hava teir klára, í høvuðsheitum, við at vinna dystirnar ímóti sínum beinleiðis kappingarneytum og teimum veikaru liðunum. Til dømis hava teir vunni 7 út av 9 møguligum stigum ímóti AB, sum síggja út til at standa eftir við svartaperi.
Okkara menn iðraðu seg sera nógv eftir dystin við Stóra, har vit vendu 2-0 til 2-2 og sá hetta út til at gerast eitt fullkomi comeback, tí vit vóru nærri 2-3. Men Poul Ingason hjá TB vísti seg frá síni bestu síðu, og skoraði til 3-2 í yvirtíðini. Eftir hetta høvdu vit enntá bóltin aftur í málinum hjá teimum, men tað bleiv bríksla fyri rangstøðu. Um vit skulu taka okkurt positivt við frá hesum dystinum, eigur tað at vera at vit vísa góðan vilja og ongantíð geva upp.
Tað einasta málið, sum vit kunnu náa í ár, er 5. pláss, sum gevur ein heimadyst meira í næsta ár, so er bara at vinna í dag, tí vit møta HB í næsta umfari, sum er liðið á 5. plássi.

Næsta heimadyst, sum er 27. og seinasta umfar, møta vit so KÍ, sum hevur ligið á odda síðan 12. umfar......

Koyrið á drongir.
Góðan dyst øll somul

*Birgir*

Fyrr í ár gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 21-04-2016 | ÍF-Skála | 2-2 |
| 16 | 24-06-2016 | Skála-ÍF | 1-0 |

(Skála var í 1. deild í fjør)

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8 | 11-05-2014 | Skála-ÍF | 2-2 |
| 16 | 27-07-2014 | ÍF-Skála | 1-0 |
| 21 | 25-08-2014 | Skála-ÍF | 0-2 |

(Skála var í 1. deild í 2009-2013)

Í 2008 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2 | 20-04-2008 | ÍF-Skála | 1-0 |
| 16 | 06-08-2008 | Skála-ÍF | 3-2 |
| 24 | 27-09-2008 | ÍF-Skála | 1-1 |

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Tippikapping

Tippikapping Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest røtt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| **HB** | **ÍF** | | | | |
| NSÍ | AB | | | | |
| TB | Skála | | | | |
| KÍ | B68 | | | | |
| Víkingur | B36 | | | | |
| Navn: | | | | | |
| Telefonnummar | | | | | |





**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

NORÐOYA SPARIKASSI



www.ns.fo

Netbankin
sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 – 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

www.gassola.fo



# Magni á Lakjuni hugleiðir

Magni á Lakjuni



Nú kappingar árið nærkast endanum, og vit hava næstseinasta heimadyst í dag, hava vit vent okkum til ein av okkara egnum leikarum, sum eisini kom nakað víða um í síni yrkisleið.

Frá 1990-2005 var Magni á Lakjuni at síggja í føroyskum toppfótbólti, og árini síðan hevur hann spælt á lægri støði. Tað er í hesum ørindum at vit hava sett honum nakrar spurningar í samband við hansara lív sum fótbóltsspælari og ikki minst ÍF'ari.

**1. Hvat er tað fyrsta minnið sum tú hevur sum fótbóltsspælari?**

Fyrsta minnið sum fótbóltspællari er í piltadeildini, tá eg sum 8-9 ára gamal í '82 spældi heilan vøll við leikarum sum vóru 2-3 ár eldri enn eg. Eg dugdi ikki rangstøðureglarnar og fekk okkurt glepsi at eg ofta var í rangstøðu :)

Í '83 kom smápiladeildin á fyrsta sinni, og tá varð leikt á hálvum vølli. Her eru rættuliga mong góð minnir, saman við leikarum sum: Fróða Petersen, Njal (abba), Jonhard Justinussen, Erling Joensen, Pól Gudmundsen, Símun Eliasen, John Eldevig, Símun Eliasen o.ø

**2. Hvørjir leikarar, sum tú ert uppvaksin saman við, minnist tú serliga? Hví?**

Tað eru nógv nøvn sum renna mær í huga, men eg vil nevna Rógva Róin og Símun Eliasen, núverandi venjaran hjá ÍF. Ørsøkin er, at vit spældu saman annaðhvørt ár og vóru sera væl samanspældir. Vit vóru allir kreativir leikarar við góðum tekniskum førleikum, so tað var mangan eitt "Barca tiki-taka" flow í spælinum, bæði sum smápiltar, dreingir, unglingar og vaksnir.

**3. Hvussu vilt tú lýsa gongdina í tínari yrkisleið?**

Mín yrkisleið hevur verið ein spennandi ferð, tá eg líti aftur á hana. Byrjaði í 1990 á besta liði sum 16 ára gamal, og fekk møguleikan at leika saman við so frægum ÍF kempum sum Birgir Thomsen, sála, Eyðuni á Lakjuni farbróðir, Ábraham Løkin, Ólavi Christiansen o.ø. Spældi eisini ímóti Meinhardt Dalbúð, mammubeiggja, sum tá var venjari á Skála. Hendan tíðin var góð, læru- og minningarík fyri meg.

Í 1994 var eg í Vejle og spældi eg her m.a saman við Thomas Gravesen, sum seinni varð seldur til Real Madrid og Everton. Vit

Framhald á síðu 18

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin situr"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum. Vit høvdu ikki Tips 13 við í síðstu kapping, men til hesa skránna valdu vit at hava hana við aftur. Mótstøðumaðurin hjá Rúna hesaferð, var eingin annar Margeir Toftegaard. Hóast Rúni einans megnaði at skava sær 4 stig saman, so vísti tað seg, at Margeir ikki kundi skava meir enn 2 av 13 møguligum stigum. Tað gjørdi so, at Rúni vann, og er samlaða støðan so 10-1 til fjepparanar. Í ársins síðstu leikskrá verður enn ein kapping.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | MT | RP |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dóttir til ein fyrrverandi danskan landsliðsleikara hevur fingið ein leiklut í sjónvarpsrøðini Vikings. Hvør er fyrrverandi landsliðsleik | Allan Nielsen | Stig Tøfting | Jes Høgh | 0 | 0 |
| 2 | Hvussu eitur venjarin hjá Hull? | Steve Clarke | Steve Bruce | Mike Phelan | 0 | 0 |
| 3 | Hvør hevur spælt flest landsdystir fyri svenska landsliðið? | Thomas Ravelli | Anders Svensson | Andreas Isaksson | 0 | 0 |
| 4 | Hvør var einasti leikari, sum spældi allar 27 dystirnar fyri ÍF í 2011? | Bøgi A. Løkin | Høgni Zachariassen | Dánjal á Lakjuni | -0.5 | -0.5 |
| 5 | Hvat blusunummar spælir Jóan Símun Edmundsson við, tá hann umboðar OB í donsku superliguni? | 7 | 9 | 10 | 1 | 1 |
| 6 | Úr hvørjum felag keypti Liverpool Ragnar Klavan? | Mainz | Augsburg | Hoffenheim | 0 | 1 |
| 7 | Nær spældi Kári Reynheim sín síðsta landsdyst fyri Føroyar? | 1991 | 1993 | 1995 | 0 | 1 |
| 8 | Í 1992 spældi føroyska U17 landsliðið NM kapping í Noregi. Tveir ÍF'arar vóru við í øllum dystunum. Hvørjir? | Bartal Eliasen og Jákup Baldvinsson | Jákup Helgi Egholm og Eyðolvur R. Petersen | Rógvi Róin og Símun Eliasen | 1 | 1 |
| 9 | Hvat av hesum feløgum hevur Roberto Baggio ikki umboðað? | Inter | MilanC12 | Lazio | 0 | 0 |
| 10 | 3. september 2005 tapti Føroyar 3-0 á útivølli móti Fraklandi. Hvør leikari skeyt tvey av málunum fyri Frakland? | Djibril Cissé | Thierry Henry | Sylvain Wiltord | 0 | 1 |
| 11 | Hvør vann silvur í donsku superliguni kappingarárið 2015/2016? | FC Midtjylland | SønderjyskE | Randers | 1 | 0 |
| 12 | Í móti hvørjum skeyt Francesco Totti sítt mál nummar 250 í Serie A fyri Roma? | Torino | Empoli | Sassuolo | 0 | 0 |
| 13 | Hvør av hesum hevur fingið flest gul kort fyri besta liðið hjá ÍF? | Atli Petersen | Eyðun Ryggshamar | Poul Ennigarð | -0.5 | -0.5 |
| | **Tilsamans** | | | | **2** | **4** |

Rætt svar: 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – 2 – 1 – 2 – 1 – X – 1 – X




Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

*...og nógvar aðrar tænastur*

**Fuglafjarðar kommuna**


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER
tomaco
Ubro SystemPac
euskan
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartel. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein • Falkavegur 6 • Postboks 3229 • FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 • Fax +298 344 601 • www.krosstein.fo • krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

## Hagtøl

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| **2/10/2016** | **ÍF-Skála** |
| 2/10/2016 | B36-NSÍ |
| 2/10/2016 | B68-HB |
| 2/10/2016 | Víkingur-TB |
| 2/10/2016 | AB-KÍ |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 16/10/2016 | TB-Skála |
| 16/10/2016 | KÍ-B68 |
| 16/10/2016 | Víkingur-B36 |
| **16/10/2016** | **HB-ÍF** |
| 16/10/2016 | NSÍ-AB |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 21 | NSÍ |
| Jóannes Bjartalíð | 17 | KÍ |
| Páll A. Klettskarð | 17 | KÍ |
| Sølvi Vatnhamar | 13 | Vík. |
| Albert Adu | 13 | TB |
| **Adeshina A. Lawal** | **12** | **ÍF** |
| Filip Djordjevic | 10 | Vík. |
| Árni Frederiksberg | 10 | NSÍ |
| Patrik Johannesen | 9 | AB |
| Róaldur Jakobsen | 9 | B36 |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | Mál |
|---|---|
| Adeshina A. Lawal | 12 |
| Clayton Soares do N. | 4 |
| Bogi Reinert Petersen | 4 |
| Dánjal á Lakjuni | 4 |
| Andy Ó. Olsen | 2 |
| Ari Ó. Ellingsgaard | 2 |
| Jan Ó. Ellingsgaard | 2 |
| Karl A. Løkin | 2 |
| Poul N. Mikkelsen | 1 |
| Kristoffur Jakobsen | 1 |
| Leivur Joensen | 1 |
| Alex José dos Santos | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 24 | 17 | 3 | 4 | 54 | 22 | 32 | 54 |
| 2 | Víkingur | 24 | 16 | 4 | 4 | 53 | 24 | 29 | 52 |
| 3 | NSÍ | 24 | 16 | 1 | 7 | 53 | 32 | 21 | 49 |
| 4 | B36 | 24 | 12 | 7 | 5 | 39 | 24 | 15 | 43 |
| 5 | HB | 24 | 10 | 6 | 8 | 37 | 27 | 10 | 36 |
| **6** | **ÍF** | **24** | **9** | **4** | **11** | **39** | **51** | **-12** | **31** |
| 7 | TB | 24 | 7 | 5 | 12 | 28 | 41 | -13 | 26 |
| 8 | Skála | 24 | 6 | 5 | 13 | 21 | 37 | -16 | 23 |
| 9 | AB | 24 | 3 | 6 | 15 | 26 | 41 | -15 | 15 |
| 10 | B68 | 24 | 0 | 7 | 17 | 17 | 70 | -53 | 7 |

## Liðini í dag

| | | |
|---|---|---|
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 12 | Elias Rasmussen | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 20 | Jóhan Petersen | |
| 22 | Ingi Sørensen | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 46 | Jákup Mikkelsen | (M) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

Venjari Jákup Mikkelsen
Venjari Símun Eliasen
Liðleiðari Ólavur Larsen
Liðleiðari Trúgvi Nesá
Liðleiðari Dan Petersen

SKÁLA 1965

| | | |
|---|---|---|
| 1 | András Gangó | (M) |
| 2 | Ari Olsen | |
| 3 | Rógvi E. Nielsen | |
| 4 | Jákup Jacobsen | |
| 5 | Fritleif í Lambanum | |
| 6 | Pætur Dam Jacobsen | |
| 7 | Ólavur Mikkelsen | |
| 8 | Símun P. Poulsen | |
| 9 | Rasmus Andersson | |
| 10 | Jákup Johansen | |
| 12 | Rógvi Ryggshamar | (M) |
| 14 | Hendrik á Fríðriksmørk | |
| 15 | Jákup Joensen | |
| 16 | Pauli G. Hansen | |
| 17 | Jónhard Frederiksberg | |
| 18 | Jan I. Hansen | |
| 19 | Teitur R. Joensen | |
| 20 | Edvin Jacobsen | (L) |
| 21 | Brian Jacobsen | |
| 22 | Arnhold Berg | |

Venjari Pauli Poulsen
Hjálparvenjari Poul N. Poulsen
Liðleiðari Sverri Jensen
Liðleiðari Rógvi Rasmussen

Bóltstuðul er Leif Andre Eliasen

Dómari: Ransin Djurhuus
Hjálpardómarar: Vinjard Dam Rani Skaalum
4. dómari: Bent T. Linklett
Eygleiðari: Jónfinn


sponsored
by
INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur


Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Tróndur í Gøtu
Finnur Fríði
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøta | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
pl stórbilar®
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

## VEST PACK

*...meira enn pakkitilfar!*

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakkimaskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar

Dekksøla

Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**

**Tlf. 441111**



Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

- vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37

Tórshavn | Tel 348 900

inni@inni.fo | inni.fo

INNI

## Vitja handil okkara á Hjalla

Her fær tú alt innan vask og reingerð á einum stað



**KEMILUX**

**www.kemilux.fo**



Framhald av síðu 7

vunnu DM í U23 og var eg framherji saman við eitt nú Kaspar Dalgas og Peter Gravlund,

Annars eru greipurnar við HB í '98 og B36 í 2001 nakað, sum eisini eru minningaríkar løtur. At eg slapp at enda sirkulin í IF var eisini serligt fyri meg.

**4. Hvør var tín yndisvenjari?**

Eftir 15 árum í bestu deild, havi eg uppliva nógvar góðar venjarar, har allir hava havt ymiskar góðar førleikar og tískil er torført at taka nakran framum. Nevnast kunn menn sum Ábraham Løkin, Meinhardt Dalbúð, Petur Simonsen, Petur Mohr, Sigfríður Clementsen, Piotr Krakowski. Allir góðir venjarar við sínum styrkjum.

**5. Hvat er títt dreymalið av viðleikarum? (Sett upp í eina 4-4-2 leikskipan)**

Her er somuleiðis ómetaliga torført at velja lið, men hetta ÍF-liðið er eitt boð:

**Málmaður:** Tórður Thomsen

**Verja:**

Torkil Hansen, Bartal Eliasen, Áslakur Petersen og Eyðálvur Petersen

**Miðja:** Ábraham Løkin, Símun Eliasen, Rógvi Róin og Ólavur Christiansen

**Álop:** Bárður á Lakjuni og eg :)

**6. Um tú kundi valt ein av tínum viðleikarum, sum skuldi komið inn á okkara lið í dag, hvør skuldi tað so verið?**

Òlavur Chriastiansen er eitt gott boð

**7. Hvat er tín minningarríkasti dystur sum ÍF'ari?**

Fleiri góð minnir, men helst dysturin í Runavík í sept. '97. Símun Eliasen og eg vóru í Danmark í lestrarørindum og boðsendir at leika við ÍF, sum lá í tungum sjógvi í bestu deildini. Vit vunnu dystin 4-2 og eg skoraði 3 mál. Rómurin eftir dystin var á hædd við at vinna FM.

**8. Fylgir tú enn við føroyskum fótbólti? Hvussu nøgdur ert tú við gongdina?**

Ja, eg vitji Gundadal javnan sunnudagar og royni at fylgja við ÌF. Hjartað er reytt/hvítt og tað broytist ikki. Verandi ÍF lið er eitt gott lið við evnaríkum leikarum, sum tó burdu ligið nakað ovari á tabellini, men tað er ikki altíð tað gongur eftir vild.

Synirnir leika við ávikavist HB og B36, so eg plagi at siga at vit hava altíð okkurt at fegnast um í húsinum. Eitt árið vunnu vit gull, silvur og bronsu við teimum trimum effoliðnum:)

Fari at enda við at takka fyri tíðina í ÌF, sum hevur verið mær ómetaliga góð, við nógvum stuttligum og ríkum løtum saman við nógvum tykkara, bæði leikarum og viðhaldsfólki - og minnast til at: "*Vit leikarar gera altíð okkara besta á vøllinum og stuðulin frá tykkum áskoðarum hevur ómetaliga nógv at siga fyri liðið - serliga tá mótgongdin er størst*".

*Magni á Lakjuni*






Jógvan Weihe

Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98

Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 9.00 - 17.00 | Hósdag | 9.00 - 18.00 |
| Týsdag | 9.00 - 19.00 | Fríggjadag | 9.00 - 17.00 |
| Mikudag | 9.00 - 19.00 | Leygardag | 9.00 - 13.00 |

Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo



teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo




KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

GER
SJÓLÍVIÐ
LÆTTARI

KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax: +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo

## Uppflytingin 2007

| Navn | Dystir | Mál |
|---|---|---|
| Nenad Saric | 25 | 15 |
| Bartal Eliasen | 19 | 14 |
| Atli Petersen | 21 | 12 |
| Elvan Taser | 17 | 6 |
| Helgi L. Petersen | 8 | 6 |

# ÍF'arin



| | |
|---|---|
| Navn: | Elias Rasmussen |
| Føðingardagur: | 13-05-1996 |
| Føðistað: | Norðagøta |
| Starv: | Lærlingur sum eletrikari |
| Pláss á vøllinum: | Málverji |
| Yvirtrúgv: | Slái á tvørttræi á egna málið, áðrenn dyst |
| 3 orð sum lýsa teg: | Álítandi, treiskur og vinnaralyndi |
| Torførasti mótstøðumaður: | Klæmint A. Olsen |
| Frítíðarítriv: | |
| Vónir fyri 2016: | Vinna rest |

## Tín Ítrótt:

| | |
|---|---|
| Fyrsti dystur á 1.liðið: | 25-04-2013 |
| Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: | 24-07-2016 |
| Aðrar ítróttargreinar: | Nei |
| Minningarríkasti dystur: | 24-07-2016, vunnu á KÍ 4-2 |
| Størstu fótbóltsliga ávirkan: | Atli Gregersen |
| Besti fótbóltsleikari: | Manuel Neuer |
| Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: | Onga |
| Hvat slag av venjing dámar tær best: | Interval |
| Hvat slag av venjing dámar tær ikki: | Taktiska venjing |

## Tínir favorittar:

| | |
|---|---|
| Matur og drekka: | Flak og mjólk |
| Slag av tónleiki: | Popp tónleik |
| Sjónvarpssending: | |
| At slappa av: | |
| Troyggja nr.: | 12 |
| Besti fótbóltsleikari nakrantíð: | Peter Smeichels |
| Sjónvarp/filmstjørna: | Tom Hardy |
| Besta bók/blað: | |
| Stuttligasti persónur: | Chandler Bing |
| Stuttligasti í hópinum: | Ingi Sørensen |
| Besti ÍF áskoðari: | Mirjam Hansen og Emma Rasmussen |

## Leikarafakta:

- Er ein av trimum gøtumonnum, sum hevur spælt í ár. Hinir eru Hallgrím og Ingi
- Hevur einans umboðað Víking og okkum
- Er skrásettur fyri tilsamans 130 dystir, har 76 av teimum eru í 1. deild og 16 eru í Effo-deildini.
- Hevur skotið eitt mál
- Hevur umboðað U17, U19 og U21 landsliðini, har hann hevur spælt 11, 5 og 6 dystir.
- Er beiggi til Arna Rasmussen, ið ger seg sum dómara í lægru deildunum.
- Hevur 810 vinir á Facebook.
- Er skrásettur fyri 6 gul og 1 reytt kort
- Síðsti dystur í Effo-deildini fyri Víking var móti ÍF, ímeðan fyrsti dystur fyri ÍF var 4-2 sigurin á KÍ í Klaksvík.


Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara hansara og børnini, nú alt undir somu lon"

S/PF AP BUSSKOYRING
– altíð til dystin fús

Ring til okkum á
Tel 23 52 50 · buss@buss.fo



# JOHN's

KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

# LIVANDI TÓNLEIKUR

## HVØRT VIKUSKIFTI

## ALTÍÐ **PUBQUIZ**

## LEYGARKVØLD KL. 22

## OG VIT VÍSA SJÁLVANDI **DYSTIRNAR**!

**OPIÐ: FRÍGGJADAG 19—04 — LEYGARDAG 17—04 — SUNNUDAG 17—23**

FYLG VIÐ Á FACEBOOK **/ JOHN'S Í FUGLAFIRÐI**